


www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 04 - 2013

# Norðurnorra fegnast um nýtt oljuøki í Barentshavi

Norska stjórnin hevur gjørt av at lata upp eitt nýtt øki í syðra partinum av Barentshavinum fyril oljuleiting. Hetta kemur í kjalarvørrinum av, at eitt drúgvt marknastríð millum Norra og Russland er komið uppá pláss. Hetta skrivar tíðindastovan NTB. Hetta er ein søgulig løta. Fyri fyrstu ferð síðani 1994 kunnu vit nú lata eitt heilt nýtt øki upp fyri oljuleiting. Tað fer at skapa nýggjar møguleikar og nýggj bein at standa á hjá Norðurnorra og tryggja virðisøking uppá longri sikt, sigur Ola Borten Moe, oljumálaráðharri. Økið er 44.000 fermetrar stórt og hevur mark til russiska landgrunnin. Marknastríðið forðaði í mong ár Norra at kanna økið, sum tí leingi hevur ligið órørt í sambandi við olju- og gassleiting. Eisini umboð fyri ídnaðin í Norðurnorra rósa stjórnini fyri avgerðina. Hetta kundi ikki gingið skjótari, sigur leiðarin fyri veitararnar í Norðurnorra, Arvid Jensen. Metingar, sum norska Oljudirektoratið hevur gjørt, vísa, at stórir møguleikar eru fyri at finna olju og gass í økinum. Tíðindini um upplatingina fella tó ikki í góða jørð alla staðni. Eitt nú er Naturvernforbundet sera ónøgt við avgerðina.